# Maerskrisi á Havnini

**Mánakvøldið kom eitt av heimsins størstu frálandaskipum á Havnina at bíða eftir betri veðri. Skipið, sum saman við trimum øðrum skipum, tekur akkerini hjá Sovereign Explorer uppaftur eftir ta spennandi boringina í vetur, er mannað við føroyingum bæði á brúnni og í maskinuni.**

FRÁLANDASKIP KROKA
*Jan Müller*



*Risastóra frálandaskipið Maersk Attender á Havnini í gjár.*

*Mynd Jens K Vang*

Mong havnafólk mundu stúrsa við, tá tey tíðliga gjáramorgunin sóu ikki færri enn fýra risastór frálandaskip við bryggju í Havn. Hetta er so bara enn ein partur av tí oljutilgongd, sum er í Føroyum í løtuni, har risastórir boripallar leita eftir olju og gassi á landgrunninum. Hesaferð eru teir komnir til Føroya at hjálpa til at rigga av eftir fyrstu boringarnar her. Boripallurin Sovereign Explorer, sum hevur borað tveir brunnar, tekur nú akkerini upp og verður sleipaður til Skotlands.

Sum ikki einaferð finna vit føroyingar umborð á flestu av teimum skipum, sum arbeiða í útlendsku frálandavinnuni. Við hesum eina av flaggskipunum í tí tyngra endanum á frálandaflotanum hjá Maersk eru ikki færri enn tríggir føroyingar. Johannus Magnussen er yvirstýrimaður og er av Nesi í Eysturoynni. Niclas Kenneth Joensen er 1. meistari og er úr Havn. Sylvi Hansen er skipari. Hann er úr Klaksvík. Sylvi er ikki við henda túrin, men kemur umborð aftur í januar. 11 mans eru við skipinum. Tað er meira sjáldsamt, at tríggir av yvirmonnunum eru føroyingar.

Vit hittu Johannus Magnussen, yvirstýrmann, tá vitjað varð umborð um middagsleitið týsdagin. Johannus hevur verið við skipinum frá byrjan ella tilsamans 8 túrar og honum dámar sera væl arbeiðið og skipið.

Mærsk Attender er spildur nýggjur í danska frálandaflotanum. Hann er bygdur í Eysturtýskalandi í fjør og kostaði nærum 400 mill. kr. Hann er ein tann størsti av sínum slag í heiminum.

Teir arbeiða fyri tað mesta í Norðsjónum og vestan fyri Hetland. Hetta er so fyrsti túrurin í føroyskan sjógv.

Talan er um eitt sokallað ankerhandlingsskip. Tað verður brúkt til at taka akkerð upp og flyta boripallar. Eisini virkar tað sum vanligt útgerðarskip. Útgerðin umborð er eisini hareftir. Skipið kann toga 290 tons. Bert eitt norskt skip kann toga meira, íalt 306 tons. Men spæli- og trumluorkan á Maersk Attender er øgilig og nógv tann størsta í heiminum, umleið 625 tons. Á bremsuni kunnu teir hava 830 tons.

Skipið hevur fýra maskinur uppá íalt 23.500 hestar. Haraftrat hevur tað framman ein bowtrustara uppá 1900 hestar og eina skrúvu, sum kann skjótast niður uppá 1700 hestar og aftan hava teir tveir tunniltrustarar (skrúvur, sum ganga gjøgnum alt skipið) upp 1200 hestar hvør. Teir teir koyra við øllum fýra motorum er ferðin 17,5 míl.

Tá akkerini verða tikin upp á boripallum verða fýra skip av hesum slag brúkt, meðan bert eitt skip verður brúkt at toga boripallin. Ta uppgávuna hevur norska útgerðarskipið, ið eisini hevur ligið á Havnina í ringa veðrinum.

## Spennandi gongd

Johannus Magnussen vónar ikki, at hetta verður seinastu ferð teir arbeiða í føroyskum sjógvi. Sjálvur fylgir hann sera neyvt gongdini í Føroyum, nú leitað verður eftir olju. –Hetta er ein sera spennandi tíð, og eg vóni, at okkurt spyrst burtur úr. Hetta er so bert byrjanini og verða fleiri boringar á djúpum vatni, eru tað m.a. skip sum hetta, ið boð verða eftir, so helst koma vit aftur í føroyskan sjógv um ikki so langa tíð.

Johannus Magnussen ivast ikki í, at verður oljuvinna veruleiki í Føroyum, so verður hettta eitt sera gott høvi hjá føroyingum, ið manna útlendsku frálandaskipini at koma í føroyskan sjógv at arbeiða, tvs. nærri familjuni og heiminum. Hann heldur, at tað í dag kanska eru einir 70 til 100 føroyingar í júst frálandavinnuni, og flestu av teimum eru á brúnni ella í maskinuni. So verður talan um munandi leiting og framleiðslu eisini, eiga vit longu fólkið til at manna okkara egna frálandaflota. –Hví kunnu vit føroyingar ikki sjálvir klára hetta heldur enn at skula sigla fyri aðrar leggur Johannus aftrat.

Johannus Magnussen sær tí eisini møguleikan fyri, at vit byggja okkara egnu skip verður talan um eina stóra oljuvinnu. Og vísir í hesum sambandi til virksemið hjá Thor í Hósvík, sum nettupp hevur lagt seg eftir at byggja upp føroyska ekspertisu umborð á okkara egnu skipum. Hann heldur tó, at vit eiga ikki at leypa framav men byggja hetta upp sohvørt og ikki sum tað oftani hevur verið í Føroyum, tá nakað nýtt stingur seg upp, at tað bara verður bygt og bygt.

-Hetta er ein góð bransja men fortreytin er at hava góð skip, tá hugsað verður um hetta serliga farvatnið, serstakliga á vetri sigur Johannus Magnussen hesa løtuni teir liggja inni á Havnini og bíða eftir betri veðri.

Nú gongur so leiðin út aftur á landgrunnin. Áðrenn teir komu inn høvdu teir tikið upp tvey av teimum 8 akkerunum. Umframt Maersk Attender eru eisini eitt bretskt ankerhandlingsskip og tvey norsk við í arbeiðinum. Á Havnini fyrrapartin týsdagin lógu ikki færri enn fýra frálandaskip og bíðaðu eftir veðri at fara út aftur til Sovereign Explorer, sum nú skal togast til Skotlands. Føroyska manningin á boripallinum hevur longu fingið arbeiði umborð á øðrum pallum í Norðsjónum.



*Johannus Magnussen er av Nesi og er yvirstýrimaður á danska frálandaskipinum*

*Mynd: Jens Kr. Vang*



*Ikki færri enn fýra frálandaskip vóru á Havnini í gjár.*

*Mynd Jens Kr. Vang*



# Rakettir eftir Arafat

**Ísraelskar stríðstyrlur skutu í gjár rakettir eftir høvuðsskrivstovuni hjá Yasser Arafat í býnum Ramallah**

ÚTLAND
*Fartekst*



*Álopið á skrivstovuna hjá Arafat í Ramallah var fyribils tað seinasta í einari røð av ísraelskum álopum, sum byrjaðu mánadagin, og sum vórðu ætlað sum hevnd fyri palestinsku bumbuatsóknirnar leygardagin og sunnudagin, tá 26 ísraelsmenn doyðu, og umleið 200 fingu skaða*

*Mynd: Reuter*

Sambært vesturlendskum tíðindafólkum raktu tríggjar av rakettunum mál, sum vóru bara fáar metrar frá skrivstovuni hjá Arafat.

Palestinskir tænastumenn tóku alt fyri eitt til rýmingar, men Arafat sjálvur var ikki at síggja. Talsmenn hansara søgdu, at palestinski leiðarin var til arbeiðis á skrivstovuni.

Sambært einum tíðindamanni hjá bretska BBC brast ein rakett so tætt skrivstovubygninginum, at stórt hol kom í veggin. BBC vildi eisini vera við, at tvey fólk fingu skaða av brestinum.

Álopið á skrivstovuna hjá Arafat í Ramallah var fyribils tað seinasta í einari røð av ísraelskum álopum, sum byrjaðu mánadagin, og sum vórðu ætlað sum hevnd fyri palestinsku bumbuatsóknirnar leygardagin og sunnudagin, tá 26 ísraelsmenn doyðu, og umleið 200 fingu skaða.

Ísraelski forsætisráðharrin, Ariel Sharon, hevur gjørt greitt, at Arafat má átaka sær alla ábyrgdina av teimum blóðugu bumbuatsóknunum seinasta vikuskiftið.

Ísrael sigur, at palestinsku sjálvsstýrismyndugleikarnir við Arafat á odda mugu roknast sum ein felagsskapur, ið tekur undir við yvirgangi. Samstundis hevur ísraelska stjórnin lýst lívverjuna hjá Arafat, Deild 17, sum yvirgangsbólk. Sama skoðsmál hevur vápnaði parturin av Fatah-felagsskapinum hjá Arafat fingið.

Avgerðin hjá ísraelsku stjórnini bera í sær, at hesir felagsskapirnir nú eru lóglig álopsmál hjá ísraelska herinum.

# Vandi fyri nýggjum yvirgangi í USA

**Amerikansku myndugleikarnir siga seg hava fingið hóttanir ímóti landsins trygd**

ÚTLAND
*Fartekst*



*- Vit eru framvegis í kríggi, og vit eru framvegis í vanda, segði Tom Ridge, trygdarovasti á einum tíðindafundi í Hvítu Húsunum*

*Mynd: Reuter*

Sambært Tom Ridge, sum hevur ábyrgdina av innanríkistrygdini í USA, benda hóttanirnar á, at onkur er í ferð við at fyrireika eina yvirgangsatsókn. Stjórnin hevur tí givið løgregluni og teimum ymsu trygdartænastunum boð um at vera til reiðar, og almenningurin hevur fingið boð um at hava eygu og oyru opin.

- Vit eru framvegis í kríggi, og vit eru framvegis í vanda, segði Tom Ridge, trygdarovasti á einum tíðindafundi í Hvítu Húsunum.

Hann legði tó afturat, at myndugleikarnir hava ikki fingið nakra beinleiðis hóttan um ávíst slag av yvirgangi, og at tað tí ikki ber til at siga nakað neyvt um, hvør ella hvat er í vanda.

- Tær upplýsingar, sum vit hava, geva ikki ábendingar um nakað ávíst álopsmál, og vit vita heldur ikki, um ætlanin er at leypa á her í sjálvum USA, ella talan er um amerikanskt mál aðrastaðni í heiminum, segði Tom Ridge.

Hetta er aðru ferð síðani tann 11. september, at amerikansku myndugleikarnir ávara um, at vandi er fyri fleiri yvirgangsatsóknum.

# Sellafield sleppur at byggja út

**Altjóða havrættardómstólurin havnaði írska kravinum um at steðga ætlanunum at byggja tað umstrídda Sellafield-verkið út**

ÚTLAND
*Fartekst*

Tað var í síðsta mánað, at írska stjórnin bað altjóða havrættardómstólin steðga ætlanini hjá bretsku myndugleikunum at byggja kjarnorkuendurvinningarverkið Sellafield út Verkið er á bretsku útnyrðingsstrondini og sostatt ikki langt frá Írlandi.

Stjórnin í London hevur góðkent ætlanina hjá leiðsluni á verkinum, sum hevur gjørt av at lata upp nýggja verksmiðju, sum skal viðgera eina samanrenning av plutonium og utanoksid, tað sonevnda MOX-brennievnið. Eftir ætlanini hjá leiðsluni skal hetta virksemið byrja longu tann 20. desember, men fleiri umhvørvisverndarfelagsskapir hava biðið dómsvaldið steðga ætlanini.

Írska stjórnin heldur fast um, at tann nýggja framleiðslan fer at økja dálkingina í Írska Havinum. Harafturat hevur stjórnin í Dublin víst á vandan fyri einari møguligari yvirgangsatsókn ímóti Sellafield.

Bretska stjórnin sigur hinvegin, at írar hava ikki prógvað, at tann nýggja framleiðslan fer at elva til størri dálking. Bretar siga eisini, at tað fer at fáa stórar búskaparligar avleiðingar, verður raksturin av tí nýggja verkinum útsettur.

Felagið, sum rekur endurvinningarverkið Sellafield, BNFL, sigur, at tað nýggja virksemið ber ikki størri vanda í sær. Leiðslan vísir eisini á, at MOX-brennievnið verður longu nýtt í Týsklandi, Fraklandi, Belgia og í Sveits.

# Amerikanari bardist saman við Taliban

**Ein 20 ára gamal amerikanari situr nú fangi hjá sínum egnu. Hann bardist saman við Taliban.**

ÚTLAND
*Fartekst*

Tann 20 ára gamli John Walker Lindh varð tikin fangi eftir bardagarnar millum Taliban og Norðursamgonguna um býin Mazar-i-Sharif. Hann greiddi fangavørðunum frá, at hann æt Abdul Hamid, men mamma hansara kendi hann aftur á einari mynd, sum stóð á internetsíðuni hjá amerikanska vikublaðnum Newsweek.

Hon og maðurin høvdu ikki sæð sonin í sjey mánaðir. Hann hevði tá gingið á einum andaligum skúla har norðuri í Pakistan, men valdi tá at fara til Kabul í Afghanistan. Í samrøðu við sjónvarpið CNN hevur John Walker Lindh sagt, at hann kendi seg hugtiknan av Taliban-rørsluni.

Tann 20 ára gamli amerikanarin var illa á holdum komin, tá hann varð tikin fangi í Mazar-i-Sharif. Sum Talibanhermaður hevði hann eisini fingið sær stórt skegg.

Ein talsmaður hjá amerikanska verjumálaráðnum váttaði í gjár, at amerikansku herdeildirnar í Afghanistan hava ein fanga, sum sigur seg vera amerikanskan ríkisborgara.

John Walker Lindh vaks upp í Washington og í Kalifornia, og í Newsweek verður hann umrøddur sum ein skilagóður ungur maður, ið tók við islamskari trúgv sum 16 ára gamal.